# Námsskipan fyri útbúgvingina til námsfrøðing

Bachelor of Education (B.Ed.) sum námsfrøðingur

Bachelor of Education (B.Ed) in Preschool and Social Development

# 2023

## Fróðskaparsetur Føroya

### Námsvísindadeildin 2023

INNIHALD

Fororð ....................................................................................................................4
1 Inngangur ................................................................................................................5
2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum .........................................................6
3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL) .......................................................6
4 ECTS-áseting ............................................................................................................6
5 Upptøkukrøv ..............................................................................................................6
6 Endamál við útbúgvingini ..........................................................................................6
7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum ..............................................................7
8 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini) .........8
9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti: ......................................................................10
9.1 Bygnaðurin og innihaldið í námsfrøðingaútbúgvingini ..........................................10
9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum ..............................................................11
9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini ..........................................................13
9.4 Starvslæra ............................................................................................................13
**9.4.1 Eftirmeting av starvslæruni ....................................................................14**
9.5 B.Ed.-verkætlanin .................................................................................................15
9.6 Metingarhættir .....................................................................................................16
9.7 Próvtøkur .............................................................................................................17
**9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur ...............................................................17**
**9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdin ................................................18**
**9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming ...................................................20**
**9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið ................................................20**
**9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka ..........................................................21**
**9.7.6 Serlig atlit .............................................................................................22**
9.8 Undirvísingarmál ..................................................................................................22
9.9 Góðskriving ..........................................................................................................22
9.10 Farloyvi ..............................................................................................................23
9.11 Serlig atlit ...........................................................................................................23
9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar ...........................................................................24
9.13 Luttøkuskylda .....................................................................................................24
**9.13.1 Møtiskyldan - starvslæran ...................................................................25**
9.14 Lestrarvirkni ........................................................................................................25

9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum ........ 26
9.16 Kærumøguleikar ........ 26
9.17 Vísindaligt rættlæti (ritstuldur og svik) ........ 27
9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv ........ 27
9.19 Treytir um broyting í námsskipan ........ 27
9.20 Aðrar ásetingar ........ 28
**9.20.1 Stakgreinalesandi ........ 28**

# Fororð

**Frá Lestrarráðnum:**

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri lestrinum. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum kunnar um rættindi og skyldur teirra lesandi.

Sambært viðtøkunum skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Henda námsskipanin er góðkend av lestrarráðnum á Námsvísindadeildini tann 29.05.2024.

Vegna Lestrarráðið

Sigrid Vesturgarð, forkvinna

# 1 Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri bachelorútbúgvingina til námsfrøðingaútbúgvingina lýst. Útbúgvingin er skipað sbrt. Bolognaásetingunum, og European Credit Transfer and Accumulation System, ECTS verður nýtt at lýsa vavið í útbúgvingunum, og arbeiðsbyrðuna hjá teimum lesandi. Námsskipanin fyri útbúgvingina til námsfrøðing er gjørd við hesum lógargrundarlagi:

- Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012
- Kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 108 frá 25. juni 2021
- Kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 106 frá 25. juni 2021
- Kunngerð nr. 102 frá 17. juni 2021 um útbúgving av námsfrøðingum
- Kunngerð um próvtalastiga og døming, nr. 73, 31.mai 2013
- Kunngerð nr. 99 frá 17. juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett tí lesandi, og hvørji rættindi og skyldur hann hevur sum studentur á Námsvísindadeildini/Fróðskaparsetri Føroya.

Um tann lesandi vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn hann hevur staðið allar próvtøkur, má hann gera avtalu við lerstrarskrivstovuna/útbúgvingarleiðara um, hvussu lesturin verður fullførdur. Lestrarvegleiðingin kann leiðbeina lesandi hesum viðvíkjandi.

Størri broytingar í námsskipanum koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einstøku fakini og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu Setursins.

Dekanurin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av útbúgvingini. Útbúgvingarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina og leggur útbúgvingina til rættis.

Tórshavn 29. mai 2024

Annika Antoniussen, útbúgvingarleiðari
Námsvísindadeildin

Fróðskaparsetur Føroya

# 2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum

Heitið er:

- Bachelor of Education (B.Ed.) sum námsfrøðingur
- Bachelor of Education (B.Ed.) in Preschool and Social Development

# 3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL)

1st cycle sambært QF-EHEA og stig 6 sambært EQF-LLL

# 4 ECTS-áseting

1 ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar hjá studentunum. Eitt lestrarár við fulltíðarlestri er 60 ECTS svarandi til eina metta arbeiðsbyrðu á 1500-1800 tímar. Tá er allur lestraraktivitetur íroknaður. Útbúgvingin er í alt 240 ECTS.

# 5 Upptøkukrøv

Upptøkutreytirnar eru lýstar í *"Kunngerð um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya"* (25/6-2021).

Upptøkutreytirnar til námsfrøðingaútbúgvingina er gymnasial miðnámsútbúgving. Í serligum føri kann víkjast frá krøvunum, um umsøkjarin á annan hátt hevur ognað sær vitan og lestrarførleika, ið kann javnsetast við gymnasiala miðnámsútbúgving (kvota 2).

# 6 Endamál við útbúgvingini

Endamálið við námsfrøðingaútbúgvingini er lýst í *"Kunngerð um útbúgving av námsfrøðingum"* 17. juni 2021.

Endamálið er at útbúgva námsfrøðingar, sum eru førir fyri at fyrireika, fremja, eftirmeta, menna, og skjalprógva námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt arbeiði við børnum, ungum og vaksnum. Ein útbúgvin námsfrøðingur skal somuleiðis vera førur fyri at grunda yvir og meta um námsvísindaligar meginspurningar.

# 7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum

**Talva 1: Lýsing av almennum og fakligum førleikum**

| | |
|---|---|
| **Almennir førleikar** | |
| **Akademiskt arbeiðslag** | Megna at arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritiskt og greinandi til spurdómar og keldur. Herundir eisini orða, lýsa, greina og tulka fakligar spurdómar og seta fram væl grundaðar niðurstøður og perspektivering. |
| **Málsligir førleikar** | Megna at orða seg neyvt og gjølla bæði í munnligum og skrivligum høpum. |
| **Samskiftisførleikar** | Megna at samskifta og samstarva tilvitað við menniskju, børn, ung og vaksin, ið ein varðar av, starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar um fjølbroytt evni, við atliti at námsfrøðiligari menning. |
| **Relatiónsførleikar** | Megna at skapa góðar relatiónir við tey menniskju, ein varðar av, við eini viðurkennandi tilgongd og taka ábyrgd fyri relatiónirnar, ein er partur av. |
| **Sjálvstøðugt arbeiðslag** | Megna at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum. Loysa ítøkiligar uppgávur sjálvstøðugt og í bólki. |
| **Trupulleikaloysn** | Megna at staðfesta og loysa trupulleikar út frá einum etiskum grundarlagi, og at taka avgerðir. |
| **Vitan í praksis** | Megna at inna vitan í verki. |
| **Menning** | Megna at menna og dagføra egna læring og vitan. |
| **Fakligir førleikar** | |
| **Yrkisgrundarlag** | Megna at fyriskipa og útinna námsfrøðiligt arbeiði við støði í lógum og kunngerðum, sum eru galdandi á økinum. Megna at skilja og kritisk meta um tann logikk námsfrøðiliga arbeiði byggir á. |
| **Námsfrøðiligur og fakligur førleiki** | Duga at nýta grundleggjandi námsfrøðilig, sálarfrøðilig og didaktisk ástøði og háttaløg, tá ið námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt virksemi verður fyrireika, framt og eftirmett. Megnar við eini etiskari metingartilgongd at fyrihalda seg kritiskt til umhvørvið og menniskja. |

| | |
|---|---|
| **Relatións- og samskiftisførleiki** | Duga at skapa góð sambond við menniskju, ið hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál. Megna at taka ábyrgd av relatiónum.<br><br>Duga at samskifta skynsamt. Evna at laga seg til ymsar støður og at liva seg inn í onnur menniskju. Evna at taka atlit, at menniskju hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál við eini viðurkennandi tilgongd. |
| **Trivnaður** | Duga at skapa eitt trygt og virðiligt umhvørvi, ið stimbrar og mennir. Megna at skapa tolsemi og ein viðurkennandi sosialan felagsskap, sum inkluderar hvørt einstakt menniskja. |
| **Menning** | Evna at eftirmeta og reflektera kritiskt um praksis og taka stig til at endurskoða námsfrøðiligu tilgongdina í mun til nýtt innlit og nýggja sannkenning. Megna at luttaka í og fremja smærri granskingar- og menningarverkætlanir innan námsfrøðiliga økið. |

# 8 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini)

| | |
|---|---|
| | **Fullfíggjaður listi við læruúrtøkuni frá útbúgvingini**<br><br>Eftir lokna útbúgving, skal hin lesandi vera før/ur fyri at |
| 1 | greiða frá og greina tær lógir og kunngerðir, ið eru galdandi á stovnsøkinum og umseta tær til námsfrøðiligt virksemi. |
| 2 | lýsa og greina demokratiska og kristna siðaarvin, og hvussu hesin hevur myndað virðisgrundarlagið undir føroyska samfelagnum |
| 3 | greiða frá og greina uppalingar- og myndanaruppgávuna á stovnum |
| 4 | meta um hvussu samfelagskarmar, harímillum lógarverk og aðrar politiskar avgerðir ávirka lívsrúmið, lívsmøguleikar og lívsgóðskuna hjá menniskjum |
| 5 | greiða frá fjølbroyttum námsfrøðiligum, sálarfrøðiligum og didaktiskum ástøði |
| 6 | greina og meta um ástøði og arbeiðshættir innan sosialisering, umsorgan, menning og læring |
| 7 | lýsa og greina ymisk ástøði um, hvussu menniskju búnast, sosialiserast, mennast og læra, sæð í sálarfrøðiligum, mentanarligum og søguligum ljósi |
| 8 | greiða frá dagligum námsfrøðiligum virksemi |

| | |
|---|---|
| 9 | eftirmeta og skjalfesta dagligt námsfrøðiligt virksemi |
| 10 | menna ítøkiligar menningartilgongdir og verkætlanir við støði í viðurkendum ástøðum og háttaløgum, og sum skapa líkindi fyri, at menniskju trívast og mennast |
| 11 | nýta viðkomandi fakligt ástøði og kunnleika í námsfrøðiliga virkseminum |
| 12 | greiða frá og meta um, hvussu námsfrøðiligt virksemi kann skipast soleiðis, at øll børn, ung og vaksin mennast og læra á besta hátt |
| 13 | greiða frá og greina, hvussu námsfrøðiligt virksemi kann skipast soleiðis, at tað gevur møguleika fyri ávirkan og samábyrgd |
| 14 | lýsa, greina og taka avgerðir um yrkisetisk viðurskifti |
| 15 | greina og brúka granskingargrundaðan kunnleika í námsfrøðiligum høpi |
| 16 | luttaka í, eygleiða og meta um námsfrøðiligt menningararbeiði |
| 17 | meta um, hvussu yrkissamleiki kann ávirka hugburð og arbeiðshættir |
| 18 | greina hvussu yrkissamleikin ávirkar menningar-, læru- og trivnaðarmøguleikarnar hjá teimum, ið ein varðar av |
| 19 | meta um, hvussu góðar relatiónir skapast við tey, ið ein varðar av, við støði í teirra menningarfortreytum, persónsmensku og áhugamálum |
| 20 | greiða frá grundleggjandi viðurskiftum, ið gera seg galdandi, tá gott huglag og góður trivnaður skal skapast |
| 21 | greiða teimum, ið námsfrøðingurin varðar av, samstarvsfeløgum, foreldrum og avvarandi frá samskiftis- og samstarvshættum |
| 22 | meta um samstarvshættir í einum tvørprofessionellum samstarvi við aðrar fakbólkar og myndugleikar |
| 23 | greina og brúka inkluderandi námsfrøði fyri at skapa trivna og menning hjá børnum, ungum og vaksnum |
| 24 | greiða frá hvønn týdning málsligir førleikar hava við atliti til at stuðla málmenning og samskiftisførleikum |
| 25 | greiða frá týdninginum av fjølbroytni á stovnum |

# 9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti:

## 9.1 Bygnaðurin og innihaldið í námsfrøðingaútbúgvingini

**Talva 2 Raðfylgjan í útbúgvingini**

<table>
<tr><th>Lestrar-hálva</th><th colspan="2">NÁMSFRØÐINGAÚTBÚGVINGIN</th></tr>
<tr><td rowspan="3">1.</td><td rowspan="2">Líváskoðan og siðalæra<br>10 ECTS</td><td>Kreativt námsfrøðiligt virksemi<br>5 ECTS</td></tr>
<tr><td>Námsfrøði og didaktikkur I<br>5 ECTS</td></tr>
<tr><td colspan="2">Føroyskt<br>10 ECTS</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="2">2.</td><td>Kreativt námsfrøðiligt virksemi<br>5 ECTS</td><td rowspan="2">Námsfrøði og didaktikkur II<br>15 ECTS<br><br>Starvslæra<br>(dagstovnaøkið)</td></tr>
<tr><td>Námsfrøði og didaktikkur I<br>10 ECTS</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="2">3.</td><td>Mál- og lesimenning fyri skúlaaldur<br>10 ECTS</td><td>Menniskja, stovnur og samfelag<br>10 ECTS</td></tr>
<tr><td colspan="2">Námsfrøðilig sálarfrøði<br>10 ECTS</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="2">4.</td><td>Serøkið I<br>10 ECTS</td><td rowspan="2">Serøkið II<br>15 ECTS<br><br>Starvslæra<br>(serøkið)</td></tr>
<tr><td>Vísindaástøði<br>5 ECTS</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td></tr>
</table>

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.** | **Kreativ námsfrøði I**<br>**10 ECTS** | **Kreativ námsfrøði II**<br>**10 ECTS** | **Heilsa og rørsla**<br>**10 ECTS** |
| | | | |
| **6.** | **Sernámsfrøði I**<br>**15 ECTS** | | |
| | **Námsfrøði I**<br>**15 ECTS** | | |
| | | | |
| **7.** | **Sernámsfrøði II**<br>**10 ECTS** | **Námsfrøði II**<br>**10 ECTS** | **Vísindaástøði og háttaløg**<br>**10 ECTS** |
| | | | |
| **8.** | **Starvslæra**<br>**15 ECTS** | **Bachelor verkætlan**<br>**15 ECTS** | |

Námsfrøðingaútbúgvingin er skipað við tveimum grundárum, har 1. og 2. lestrarár eru grundskeið. 1. árið endar við eini starvslæru í dagstovnaøkinum, og 2. árið við eini starvslæru í serøkinum. Á 3. og 4. lestrarári verður dentur lagdur á kreativitet og rørslu, sernámsfrøði og námsfrøði. Síðsta lestrarhálvan fevnur um eina langa einsæris starvslæru og eina Bachelor verkætlan.

Á námsfrøðingaútbúgvingini verður undirvíst parallelt í tveimum fakum. Fyri tað mesta liggja próvtøkur við endan á hvørjum kvartali. Nærri kunning um próvtøkuvikurnar er í undirvísingarskráunum.

## 9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum

Námsfrøðingaútbúgvingin er skipað í 4 høvuðspørtum:

1. **Grundskeið**

Grundskeiðini eru lisin tvey tey fyrstu lestrarárini, í alt 120 ECTS. 1. lestrarár er dagstovnaøkið í miðdeplinum, og á 2. árið er serøkið í miðdeplinum. Tey 9 grundskeiðini hesi bæði árini eru í fakøkjum, sum eru ástøðiliga grundarlagið í námsfrøðingayrkinum.

Endamálið við grundskeiðunum er, at tann lesandi fær eina breiða og holla vitan um námsfrøðiliga grundstøðið í námsfrøðingayrkinum.

## 2. Serlestur

Serlesturin umfatar 3 fakøkir, í alt 80 ECTS: Kreativ námsfrøði og heilsa og rørsla (í alt 30 ECTS), Námsfrøði (25 ECTS) og Sernámsfrøði (25 ECTS). Umfram hetta er eitt skeið í vísindaástøði og háttaløgum (10 ECTS).

Endamálið við serlestrinum er, at tann lesandi innan trý námsfrøðilig økið fær ein serkunnleika.

## 3. Starvslæran

Starvslæran er í alt 26 vikur, sum svarar til 39 ECTS. Allar starvslærurnar uttan tann síðsta eru partar av skeiðum. Síðsta starvslæran er skipað sum eitt sjálvstøðugt skeið (15 ECTS) í 8. lestrarhálvu.

Á grundskeiðnum, sum er tvey tey fyrstu lestrarárini, endar hvørt árið við eini starvslæru á 6 vikur í ávikavist dagstovnaøkinum og serøkinum.

Á serlestrinum á 3. og 4. lestrarári eru 6 praksis vikur. Hesar vikurnar verða skipaðar sum ein partur av sernámsfrøðiliga og dagstovnanámsfrøðiliga økinum.

À 4. lestrarári er ein lang sjálvstøðug einsæris starvslæra á 8 vikur, sum liggur beint áðrenn B.Ed.-verkætlanina. Í hesi starvslæru kunnu tey lesandi savna empiri til sína B.Ed. verkætlan. Tann lesandi velur hvar starvslæran skal vera. Harumframt hevur tann lesandi møguleika at fara uttanlands í hesum starvslæruskeiðnum. Hendan starvslæran skal knýtast til fakøkini, sum tann lesandi hevur lisið.

Endamálið við starvslæruni er, at tann lesandi kann royna seg í verki, megna at samantvinna ástøði og fakligan kunnleika við praksis. At kunna royna seg sum námsfrøðing relationelt, kensluliga, sosialt og í samstarvi við bæði børn, samstarvsfelagar og foreldur/avvarðandi.

## 4. B.Ed.-verkætlanin

Áðrenn lesandi kunnu fara í gongd við B.Ed. verkætlanina, skulu tey hava staðið 225 ECTS.

B.Ed. verkætlanin er 15 ECTS.

B.Ed. verkætlanin er tann endaliga uppgávan á námsfrøðingaútbúgvingini, og skal lúka tær treytir, ið verða settar til arbeiði á slíkum støði, og sum eru lýstar í skeiðslýsingini (sí pkt. 9.5)

## 9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini

Á námsfrøðingaútbúgvingini nýta undirvísararnir fjølbroyttar undirvísingarhættir. Endamálið er, at undirvísingin er innbjóðandi, lærurík og ger lesandi virkin í egnari læring.

Undirvísingarhættir, ið ganga aftur, eru m.a. fyrilestrar, floksundirvísing, bólkaarbeiði av ymiskum slagi, sjálvlestur, venjingar, lestrarferðir og vitjanir, verkætlanir, starvsvenjingar, vegleiðing og eftirmeting. Arbeitt verður eisini við kreativum tilgongdum, við m.a. bloggum og portfolio.

Fjarundirvísing (t.e. undirvísing gjøgnum Zoom og Teams) verður nýtt ístaðin fyri undirvísing á staðnum, tá ið hetta er neyðugt – ella kennist skilagott.

Námsfrøðingaútbúgvingin er fulltíðarlestur. Lesstrarárið er 40 vikur, og tey lesandi skulu rokna við at nýta í miðal millum 37½ og 45 tímar um vikuna til

- at vera til undirvísing
- at lesa viðkomandi tilfar
- at granska viðkomandi evni
- at loysa og /ella skriva ítøkiligar uppgávur
- at lýða á fyrilestrar/upplegg
- at arbeiða í størri og smærri bólkum
- at leggja fram fyri undirvísara og floksfeløgum – og lýða á framløgur
- at fyrireika seg til próvtøkur
- at fara til próvtøkur
- at vera í starvslæru

## 9.4 Starvslæra

Starvslæran á námsfrøðingaútbúgvingini er í alt 26 vikur, 39 ECTS í alt. Lesandi eru í starvslæru á hvørjum lestrarári. Starvslæran er skipað soleiðis, at dentur verður lagdur á ymisk fakøki.

| **Lestrarár:** | **Starvslæruøkið:** | **Starvslæran í vavi:** |
|---|---|---|
| **1.** | Dagstovnaøkið | 6 vikur |
| **2.** | Serøkið | 6 vikur |
| **3. og 4. (serlestur)** | Sernámsfrøði<br>Námsfrøði | 6 vikur |
| **4.** | Einsæris sjálvstøðug starvslæra – sjálvvalt økið | 8 vikur |

**Starvslæran 1. Lestrarár**
Starvslæran er 6 vikur, 120 starvslærutímar og 12 samrøðutímar. Hetta svarar til 20 tímar í praksis og 2 tímar til samrøðu/vegleiðing um vikuna. Starvslæran er málrættað praksis á dagstovnaøkinum, har tey lesandi fáa innlit í og kunnu hugsavna seg um námsfrøðiliga yrkið í praksis, og hvussu tey sjálvi roynast sum námsfrøðingar í dagsins samfelag. Lesandi verða eftirmett við støði í ásetingunum í skeiðslýsingini.

**Starvlæran 2. Lestrarár**
Starvslæran er 6 vikur, 120 starvslærutímar og 12 samrøðutímar. Hetta svarar til 20 tímar í praksis og 2 tímar til samrøðu/vegleiðing um vikuna. Starvslæran er málrættað serøkinum. Innan hetta økið hevur tað alstóran týdning, at tey lesandi fáa nøktandi stundir at koma inn í sernámsfrøðiliga arbeiðið á einum stovni fyri at vinna álit hjá brúkaranum og megna at fyrihalda seg til tær ymisku avbjóðingarnar á hesum økinum. Tann lesandi skal virka við støði í tí fakliga grundarlagnum, sum er lagt í sernámsfrøðiligu undirvísingini.

Eftir starvslæruna skulu tey lesandi eftirmetast sambært skeiðlýsingini.

**Starvslæran á serlestrinum (3. og 4. lestrarár)**
Starvslæran er 6 vikur, 120 starvslærutímar og 12 samrøðutímar. Hetta svarar til 20 tímar í praksis og 2 tímar til samrøðu/vegleiðing um vikuna.
Starvslæran verður framd sum ein praksispartur á serlestrinum innan sernámsfrøði og námsfrøði. Fakliga innihaldið er avgerandi fyri, hvussu praksisparturin verður skipaður, og lesandi verða eftirmett við støði í ásetingunum í skeiðslýsingini.

**Starvslæran 4. Lestrarár**
Starvslæran er 8 vikur, 160 starvslærutímar og 16 samrøðutímar. Hetta svarar til 20 tímar í praksis og 2 tímar til samrøðu/vegleiðing um vikuna.

Lesandi skal hava staðið allar ásettu próvtøkurnar, áðrenn tann lesandi kann byrja síðstu lestrarhálvuna, sum er starvslæran og B.Ed. verkætlanin.

Starvslæran er einsæris, har tann lesandi skal arbeiða sjálvstøðugt. Starvslæran kann takast í Føroyum og uttanlands. Starvslæran tekur støði í vitan, sum er tilognað gjøgnum alla útbúgvingina við serligum atliti til serlesturin, tann lesandi hevur lisið. Starvslæruøkið, endamál og arbeiðstilgongd kann nýtast sum empiri til B.Ed. ritgerðina. Eftir starvslæruna skulu tey lesandi eftirmetast sambært skeiðlýsingini.

### 9.4.1 Eftirmeting av starvslæruni

Allar starvslærurnar hava eina starvslæruhondbók, har tað er greitt, hvør uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum er, og hvat er kravt av tí lesandi.

Í síðstu samrøðutímunum skal starvslæruvegleiðarin hava skrivað eftirmetingina hjá tí lesandi, og hann skal gjøgnumganga eftirmetingina saman við tí lesandi.
Eftir starvslæruna skal starvslæruvegleiðarin senda Námsvísindadeildini eftirmetingarskjal, sum endar við eini meting, um starvslæran er staðin/ikki staðin.
Undirvísarin hevur skyldu at greiða teimum lesandi frá øllum viðurskiftum, sum eru starvslæruni viðkomandi, og kunna starvslæruvegleiðaran. Avvarðandi undirvísarin hevur høvuðsábyrgdina av øllum samskifti millum starvslærustovn og Námsvísindadeildina. Nærri ásetingar um endamál, innihald, starvslæruvegleiðara, miðvegissamrøðu og eftirmeting eru at finna í starvslæruhondbókini, sum verður útflýggjað, tá starvslæran verður fyrireikað og er tøk á galdandi samskiftisskipan.

## 9.5 B.Ed.-verkætlanin

Fjórða lestrarár endar við bachelorverkætlan, ið telur 15 ECTS. Verkætlanin skal verða rættað móti endamálinum við útbúgvingini til B.Ed. innan námsfrøðingayrkið, og skal hava slíkt støði, at hon verður viðurkend sum grundarlag undir framhaldslestri, bæði í Føroyum og uttanlands.

Fyri at kunna fara upp í prógvtøku í bachelorverkætlanini skal tann lesandi hava staðið øll skeið (t.e. í minsta lagi 225 ECTS).

Tey lesandi velja sjálvi eitt evni innan námsfrøðiligu fakøkini.

Endamálið við B.Ed. verkætlanini er, at tann lesandi skal velja sær eitt evni, ið er viðkomandi fyri námsfrøðingayrkið. Tey skulu megna at greina og samantvinna vísindalig ástøði og háttalag við egnar kanningar og praksis frá egnum starvslæruroyndum innan valda námsfrøðiliga økið.

Ritgerðin verður skipað kring ein spurdóm. Spurdómurin skal grundast í námsfrøðiligum avbjóðingum, sum eru týðandi fyri námsfrøðiliga virksemið. Lesandi orða sín spurdóm í samráð við vegleiðaran.

- Bachelorverkætlanin kann skrivast einsæris ella í bólki við í mesta lagi 3 luttakarum.
    - Um ritgerðin verður skrivað í bólki, so ábyrgdast tey lesandi hvør í sær fyri alla ritgerðina í munnliga partinum.
- Munnliga verjan er einsæris
    - Tann lesandi verður mettur við støði í ritgerðini og munnligu verjuni, og hann fær eitt samlað próvtal.

Lesandi hava rætt til vegleiðing meðan ritgerðin verður skrivað:

| | |
|---|---|
| Ein lesandi | 3 tímar vegleiðing |
| Bólkur við tveimum lesandi | 4 tímar vegleiðing |
| Bólkur við trimum lesandi | 5 tímar vegleiðing |

Vav:

- 1 lesandi 60.000 tekn = 25 síður (+/- 10%)
- 2 lesandi 72.000 tekn = 30 síður (+/- 10%)
- 3 lesandi 84.000 tekn = 35 síður (+/- 10%)

Tað er loyvt at hava í mesta lagi 20 síður við sum fylgiskjøl.

Munnlig próvtøkan: Munnliga verjan er 45 min. til samans og umfatar:

- Framløgan – 15 min.
- Kjak/spurningar – 25 min.
- Votering – 5 min.

Nærri reglur um bachelorverkætlanina eru ásettar í galdandi uppritinum *"Bachelorverkætlanin – reglur og mannagongdir",* ið er at finna á heimasíðu Setursins.

## 9.6 Metingarhættir

**Formativ meting**

Formativu eftirmetingarhættirnir (eisini kallað ávegis eftirmeting) eru tengdir at teimum siðvenjum, ið eru knýttar at einstøku fakunum og/ella skeiðsøkjunum og kunnu av somu orsøk verða framdar eitt sindur ymiskt frá fakøki til fakøki og frá skeiði til skeið.

Formativa eftirmetingin hevur tó altíð til endamáls at siga tí lesandi, hvussu tað gongst honum á skeiðnum, og hvat tann lesandi kann gera fyri at náa teimum læruúrtøkunum, ið eru miðdepils á fakøkinum.

Formativa eftirmetingin er ofta tengd at ítøkiligum lestraravrikum og verður givin, tá ið lesandi hava

- skrivað ein tekst
- havt eina munnliga framløgu
- skapað eitt verkligt produkt
- sett eina menningartilgongd saman/ skipað eina didaktiska ætlan fyri námsfrøðiliga virksemi
- tikið lut í einum kjakforum
- virkað í praksis innan eitt ávíst námsfrøðiligt øki

Formativ eftirmeting kann vera givin fleiri ferðir gjøgnum eitt skeið ella sum eitt meiri formligt støðumet, tá ið skeiðið er hálvrunnið.

**Summativ meting**

Summativ meting verður givin við skeiðslok, tá ið ein lesandi fær at vita, hví hann hevur fingið eitt ávíst próvtal.

## 9.7 Próvtøkur

Próvtøka er í hvørjari lærugrein/skeiði sær, og hon verður skipað eftir einum av niðanfyristandandi próvtøkusløgum, ella sum ein samanseting av hesum:

- Langar og stuttar spurdómsstýrdar uppgávur
- Langar og stuttar skrivligar uppgávur við ásettum uppgávuorðingum
- Skrivligar próvtøkur
- Fakligar ritroyndir
- Synopsur
- Verkligt arbeiði
- Munnligar framløgur við og uttan opponering
- Munnligar próvtøkur
- Portfolio
- Loggbøkur
- Uppgávur, ið taka støði í starvslæruni - starvslærufrágreiðing

Hvør próvtøkuháttur verður nýttur, verður kunnað um í skeiðslýsingunum og lestrarætlanunum til hvørt skeiðið sær, har lesandi fáa eitt serstakt skjal sum lýsir próvtøkuháttin, hvørji krøvini eru og hvussu farið verður fram.

Vísindaligir tekstir eru høvuðsgrundarlagið undir øllum skrivligum uppgávum. APA verður nýtt sum tilvísingarskipan.

Gevið gætur:

- Í metingini av skrivligum uppgávum er førleikin í rættskriving og greiðum akademiskum málburði partur av tí, sum verður mett, hóast høvuðsdenturin verður lagdur á, í hvønn mun tey lesandi hava nátt ásettu læruúrtøkunum.

### 9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur

Tá tann lesandi er upptikin á útbúgvingina, skal eitt innskrivingarblað fyllast út og latast Lestrarskrivstovuni. Tá hetta er gjørt, er tann lesandi innskrivaður til allar próvtøkur, sum eru

kravdur partur av útbúgvingini. Tá tann lesandi er innskrivaður til valskeið, verður hann innskrivaður til próvtøkuna á valskeiðnum.

Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu melda seg til fakini/skeiðini, tey skulu hava, á skrivstovuni á deildini. Tá hetta er gjørt, verða tey sjálvvirkandi tilmeldað tilhoyrandi próvtøkur.

Fyri at fara upp til próvtøku í einum skeiði skal hin lesandi hava luttikið í øllum kravdum lestrarvirkni, uppgávum, venjingum, innlatingum og royndum, sum liggja frammanundan próvtøkuni, umframt hildið kravdu møtiskylduna (sí punkt 9.13 um luttøkuskyldu).

Gevið gætur

- Um lesandi ikki møtir til próvtøku verður viðkomandi skrásettur fyri eina fullgildiga próvtøkuroynd við próvtalinum 00.
    - Undantikið um sjúkravátttan ella líknandi fyriliggur.

- Lesandi kann ikki fara upp í próvtøku í bachelorverkætlanini, fyrr enn 225 ECTS av teimum kravdu 240 ECTS eru staðin (sí punkt 9.7.2).
- Lesandi kann í mesta lagi fara upp tríggjar (3) ferðir til somu próvtøku ella aðra døming. Um skeiðið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurpróvtøku tvær ferðir.
- Dekanurin kann loyva einum lesandi at fara upp eina fjórðu (4) ferð, um serlig viðurskifti gera seg galdandi. Í hesum føri skal tann lesandi senda eina motiveraða og vælgrundaða umsókn til útbúgvingarleiðaran, sum ber umsóknina víðari til dekanin.

Allar skrivligar innlatingar skulu latast inn eftir ásettu mannagongdum og galdandi skipan.

### 9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdin

| Lestrarhálva | Skeið | Próvtøka | Endur-próvtøka | Dømd | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Lívsáskoðan og siðalæra | Munnlig próvtøka | sama | Innanseturs | Staðið/ ikki staðið | 10 |
| | Føroyskt | Skrivlig uppgáva við munnligari próvtøku | sama | Innanseturs | Próvtal | 10 |
| | Kreativt námsfrøðiligt virksemi | - (heldur fram í 2. lestrarhálvu) | - | - | - | 5 |
| | Námfrøði og didaktikkur I | Portfolio | | Innanseturs | Próvtal | 5 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Námfrøði og didaktikkur I | | Skrivlig uppgáva | | | 10 |
| | Námsfrøði og didaktikkur II | Skrivlig uppgáva við munnligari próvtøku | sama | Uttanseturs | Próvtal | 15 |
| | Kreativt námsfrøðiligt virksemi | Portfolio og munnlig framløga | sama | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 5 (10 í alt) |
| 3. | Mál- og lesimenning fyri skúlaaldur | Skrivlig uppgáva við munnligari próvtøku | Sama | Uttanseturs | Próvtal | 10 |
| | Námsfrøðilig sálarfrøði | Skrivlig próvtøka | sama | Innanseturs | Próvtal | 10 |
| | Menniskja, stovnur og samfelag | Skrivlig uppgáva | Sama | Innanseturs | Próvtal | 10 |
| 4. | Serøkið I | Skrivlig próvtøka | Sama | Innanseturs | Próvtal | 10 |
| | Serøkið II | Synopsa og munnlig próvtøka | Sama | Uttanseturs | próvtal | 15 |
| | Vísindaástøði | Skrivlig próvtøka | sama | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 5 |
| 5. | Kreativ námsfrøði I | Skrivlig uppgáva við munnligari próvtøku | sama | Uttanseturs | próvtal | 10 |
| | Kreativ námsfrøði II | Verkætlan við munnligari próvtøku | Skrivlig uppgáva | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 10 |
| | Heilsa og rørsla | Synopsa við munnligari próvtøka | sama | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 10 |
| 6. | Nanámsfrøði I | Skrivlig uppgáva | sama | Uttanseturs | próvtal | 15 |
| | Sernámsfrøði I | Munnligar framløgur | sama | Innanseturs | Próvtal | 15 |
| 7. | Námsfrøði II | Munligar framløgur | sama | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 10 |
| | Sernámsfrøði II | Skrivlig uppgáva | sama | Uttanseturs | Staðið/ikki staðið | 10 |
| | Vísindaástøði og háttaløg | Virkin luttøka | sama | Innanseturs | Staðið/ikki staðið | 10 |
| 8. | Sjálvstøðug einsæris starvslæru-praksis | Verkligt arbeiði | Sama | Uttanseturs | Staðið/ ikki Staðið | 10 |
| | Sjálvstøðug einsæris starvslæra | Starvslærufrágreiðing | Sama | Innanseturs | Próvtal | 5 |
| | B.Ed. verkætlan | Skrivlig uppgáva og munnlig próvtøka | Sama | Uttanseturs | Próvtal | 15 |

- Á námsfrøðingaútbúgvingini verður sum oftast próvmett eftir hvønn kvartal, í viku 44, 3, 12 og 23/24, uttan í lestrarhálvu 5 og 7. Í viku 23 verða B.Ed. verkætlanirnar próvmettar, og í viku 24 verða skeiðini á 1., 2. og 3. lestrarárinum próvmett.
- Endurpróvtøkurnar verða vanliga skipaðar eftir avtalu millum lesandi, avvarðandi undirvísara og um neyðugt lestrarvegleiðaran. Tað er týdningarmikið, at endurpróvtøkurnar verða avgreiddar skjótast tilber og í seinasta lagi áðrenn næsta próvtøkuskeið, tí tað kann vera trupult at avgreiða endurpróvtøkur seinni í lestrinum. Um lesandi ikki kann møta til próvtøku vegna sjúku ella annað lógligt forfall, skal hann innan 5 yrkadagar eftir próvtøkudagin lata lestrarskrivstovuni læknaváttan ella annað nøktandi prógv fyri forfallið. (Sí galdandi reglugerð um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya)

### 9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming

Próvdømingin kann vera við uttansetturs ella innansetturs próvdómara. Tá próvdømingin er uttansetturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetri Føroya.

- Uttansetturs próvdómarar skulu góðkennast av Mentamálaráðnum.

Tá ið próvtøkan er innansetturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetri Føroya.

Próvtøkukunngerðin (2021) sigur at

- í minsta lagi 1/3 av próvtøkunum (t.e. 80 ECTS) vera dømdar av uttansetturspróvdómara. Hetta er undantikið starvsvenjing.

### 9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið

Próvdømingin verður givin sum met eftir galdandi próvtalastiga (t.e. 7-talsstigin) ella sum “staðið/ikki staðið”. Fyri at hava staðið skeiðið/fakið krevst metið 02.

Próvtalastigin er lýstur í serstakari kunngerð.

Próvtøkukunngerðin (2021) sigur at

- í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (t.e. 80 ECTS) kunnu vera dømdar við staðið/ikki staðið.

Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

### 9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Lesandi, ið vegna sjúku ella annað lógligt forfall eru forðað í at møta til ásetta próvtøku, missa ikki eitt próvtøkuhøvi av hesi orsøk, men fáa møguleika at fara til próvtøku skjótast til ber ella í seinasta lagi í næsta próvtøkuskeiði.

Lógligt forfall kann t.d. vera landsliðsúttøka, onnur úrvalsíðkan, at umboða Føroyar í altjóða kappingum og tiltøkum innan t.d. list og mentan. Lestrarskrivstovan ger eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Hetta verður gjørt, áðrenn lesandi fer avstað.

**Endurpróvtøka:** Rætturin til endurpróvtøku er treytaður av, at møtt verður til regluligu próvtøkuna. Tá talan er um sjúku, er rætturin til endurpróvtøku treytaður av, at sjúkraváttanin er latin Setrinum rættstundis og á rætta stað.

**Sjúkrapróvtøka:** Undirvísarin skal hava fráboðan um, at lesandi ikki fær møtt, áðrenn próvtøkan byrjar. Rætturin til sjúkrapróvtøku er treytaður av, at sjúkraváttan er latin lestrarskrivstovuni innan fimm dagar eftir próvtøkudagin. Sjúkraváttanin skal sendast skrivstovuni lss@setur.fo.

Sjúkrapróvtøkan verður skipað eftir avtalu millum undirvísaran, tann lesandi og um neyðugt lestrarvegleiðarin. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri sjúkrapróvtøkuna. Sjúkrapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka.

Fyri bæði endurpróvtøku og sjúkrapróvtøku er hetta galdandi:

- Skipað verður fyri endurpróvtøku skjótast til ber ella í seinasta lagi í næsta próvtøkuskeiði eftir regluligu próvtøkuna. (sí annars 9.7.2)

- Lesandi, sum ikki hevur staðið eitt kravt skeið í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina.

- Lesandi hevur í mesta lagi høvi at fara 3 ferðir til próvtøku í sama skeiði. Um serligar umstøður tala fyri tí, so kann Lestrarskrivstovan eftir skrivligari og grundgivnari umsókn játta tí lesandi eitt 4. próvtøkuhøvi í sama skeiði

- Lesandi hava møguleika at fylgja við undirvísingini í skeiðinum av nýggjum í sambandi við 3. próvtøkuhøvi.

Frámelding frá sjúkra- ella endurpróvtøku uttan váttað lógligt forfall førir við sær mist próvtøkuhøvi. (Sambart reglugerð um próvtøkur á Fróðskaparstur Føroya)

### 9.7.6 Serlig atlit

Um tann lesandi hevur skerdan førleika, sálarliga ella kropsliga, verður tikið fyrilit fyri hesum innanfyri ásettu karmar í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kap. 6 § 20-20.a. Víst verður til galdandi próvtøkukunngerð § 9. Nærri kunning um hetta fæst hjá lestrarvegleiðaranum. Lestrarvegleiðingin upplýsir tí lesandi um serligar stuðulstænastur.

## 9.8 Undirvísingarmál

Undirvísingarmálið er føroyskt.

- Undirvísarar,sum ikki hava føroyskt sum móðurmál, kunnu undirvísa á norðurlendskum og/ella enskum.

## 9.9 Góðskriving

Um lesandi hevur staðið fak ella skeið á øðrum universitetum, sum eru á sama ella hægri fakligum støði við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingina sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi fak/skeið góðskrivað sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. (Sambart reglugerð á Fróðskaparsetur Føroya)

Mannagongdin fyri góðskriving er, at tann lesandi letur lestrarskrivtovuni, lss@setur.fo, á Frælsinum umsókn um góðskriving. Í umsókníni skal vera greitt

- hvat skeið, ein hevur er staðið, og hvat skeið á námsfrøðinga útbúgvingini ein ynskir at fáa góðskrivað

Lestrarskrivstovan sendir útbúgvingarleiðaranum umsóknina um góðskriving, sum so ger eitt tilmælið í samráð við viðkomandi undirvísara. Tá ið hetta er gjørt, letur útbúgvingarleiðarin lestrarskrivstovuni tilmæli ella frámæli. Síðan verður tilmælið sent lestrarráðnum, sum tekur endaligu avgerðina, um skeið kunnu góðskrivast ella ei.

Umsóknarfreist: Søkjast kann um góðskriving gjøgnum alt lestrarárið. Men um lesandi ætla at fáa skeið góðskrivað, so verður mælt til, at tey lata umsókn inn í góðari tíð.

Gevið gætur:

- Seinasta freist fyri skeið, sum byrja á vári: 1. september (heysthálvan)
- Seinasta freist fyri skeið, sum byrja á heysti: 1. januar (várhálvan)

Nærri kunning um góðskrivingar, mannagongdir og oyðubløð eru at finna á heimasíðu Setursins.

## 9.10 Farloyvi

Lesandi, ið eru innskrivað til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um farloyvi frá lestrinum í styttri ella longri tíðarskeið

Um ein lesandi ivast í at taka farloyvi, so kann viðkomandi leita sær ráðgeving hjá lestrarvegleiðaranum.

Lesandi mugu hava staðið 60 ECTS, áðrenn tey kunnu fara í **ógrundað farloyvi** (fevnir ikki um barnsbruðafarloyvi). Ógrundað farloyvi verður roknað sum lestrartíð, og tískil verður játtaða farloyvistíðarskeiðið talt við í mest loyvdu lestrartíðina fyri útbúgvingina. Lesandi mugu seta seg í samband við útbúgvingarsamskiparin, um tey ynskja at fara í farloyvi.

**Grundað farloyvi** fevnir um sjúku barnsburð, ættleiðing og aðrar serstakar umstøður. Grundað farloyvi verður ikki roknað sum lestrartíð og verður sostatt ikki drigið frá mest loyvdu lestrartíðini fyri útbúgvingina.

Umsókn um farloyvi skal latast lestrarskrivstovuni, lss@setur.fo. Umsóknarblað til farloyvi er á heimasíðuni setur.fo.

Eru ivamál verður víst til lestrarvegleiðaran.

Lestrarfarloyvi er treytað av, at tann lesandi eftir lokið farloyvi kann halda fram við lestrinum, har viðkomandi slepti, ella fylgja eini tillagaðari lestrarætlan, sum er góðkend av Lestrarskrivstovuni.

Lesandi, ið koma aftur úr farloyvi, skulu taka upp samband við lestrarvegleiðingina í góðari tíð, áðrenn lesturin verður tikin uppaftur.

(Sambart reglugerð um farloyvi til lesandi á Fróðskaparsetur Føroya)

## 9.11 Serlig atlit

a) Um ein lesandi ikki stendur B.Ed. ritgerðina, so kann viðkomandi sleppa til endurpróvtøku áðrenn næsta undirvísingarár byrjar (t.e. áðrenn hálvan august). Hetta so at tann lesandi hevur møguleika at standa prógv og sleppa í starv sum námsfrøðingur eftir summarsteðg.

b) Lesandi við skerdum virkisførleika kunnu fáa tillagaðar treytir um lestrarvirkni, sum taka neyðug atlit til tørvin hjá tí einstaka.
Tann lesandi skal senda Lestrarskrivstovuni umsókn um tillagaðar lestrartreytir, og saman við umsóknini skal leggjast skjalprógv fyri skerda virkisførleikanum hjá viðkomandi, t.d. váttan frá serfrøðingi umframt eitt uppskot til ætlaða lestrargongd.
Lestrarskrivstovan viðger umsóknina og tekur avgerð í málinum.
(Sambart reglugerð um lestrarvirkni á Fróðskaparsetur Føroya)

## 9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar

Námsfrøðingalesandi kunnu fara í skiftislestur á í mesta lagi eitt lestrarár, 60 ECTS.

Námsfrøðingalesandi kunnu taka

- Serlesturfakini á námsfrøðingaútbúgvingum í øðrum landi
- Úrvald skeið á námsfrøðingaútbúgvingum í øðrum landi

Um lesandi ynskir at fara í skiftislestur, so skal hon seta seg í samband við lestrarvegleiðingina.

Lesandi skal søkja um undangóðskriving, áðrenn søkt verður inn á útbúgvingarstovnin í útlandinum. Tað er útbúgvingarleiðarin í neyvum samstarvi við avvarðandi faklærara, ið ger undangóðskrivingina til reiðar. Lestrarráðið játtar góðskrivingina ella vísir henni aftur.

Lesandi kunnu eisini taka

- starvslæruna í øðrum landi

Námsfrøðingalesandi hava møguleika at fara í starvslæru uttanlands á fjórða lestrarárinum, tá tey hava ta sjálvstøðugu einsæris starvslæruna.

Tað er avvarðandi faklærari, ið góðtekur starvslæruplássið, og útbúgvingarleiðarin, ið gevur endaliga loyvið.

Tann lesandi kann leita sær ráð hjá lestrarvegleiðaranum og/ella útbúgvingarleiðaranum, um hann kundi hugsað sær lestrarvist í øðrum landi.

## 9.13 Luttøkuskylda

Námsfrøðingalesandi hava møtiskyldu.

Einstaki undirvísarin skrásetir, um tann lesandi møtir til undirvísing, og hann hevur skyldu at gera tann lesandi varugan við møguligt mishald í sambandi við møtiskylduna.

Er lesandi burtur meiri enn 25% av undirvísingartíðini uttan haldgóða grund (t.e. sjúka og deyðsfall í familjuni), skal viðkomandi, umframt vanligu uppgávurnar, annaðhvørt

(1) til munnliga roynd í fullum pensum við skeiðslok

(2) til skrivliga 6-tímaroynd í fullum pensum við skeiðslok

(3) ella skriva eina einstaklingsuppgávu

Avvarðandi undirvísari avgerð hvørja roynd ella uppgávu, hin lesandi skal gera.

Er lesandi burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini, fær viðkomandi boð um:

(4) at taka skeiðið umaftur.

Gevið gætur: Í hesum føri er ”haldgóð grund” ikki galdandi

Um lesandi er burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini í tveimum ella fleiri skeiðum, verður lesturin hjá viðkomandi tikin upp til viðgerðar í leiðsluni, og verður viðkomandi møguliga biðin um at steðga við útbúgvingini.

### 9.13.1 Møtiskyldan - starvslæran

Námsfrøðingalesandi hava møtiskyldu í starvslæruni.

Møtiskyldan er 100%.

Um lesandi hevur fráveru, so er neyðugt at leggja eina ætlan fyri, hvussu lesandi kann arbeiða tímarnar inn aftur. Tá talan er um sjúku, er neyðugt at fáa eina sjúkravváttan til vega. Undir serligum umstøðum við fráveru, skal starvslæruvegleiðarin seta seg í samband við undirvísaran, og bert í serligum umstøðum verður útbúgvingarleiðarin kunnaður. Um møtiskyldan verður misshildin, so verður avgerð tikin um, hvørt tann lesandi skal:

- taka írestandi partin av starvslæruni
- taka alla starvslæruna umaftur

Um lesandi ikki megnar at taka írestandi partin, so stendur tann lesandi ikki starvslæruna.

## 9.14 Lestrarvirkni

Væntað verður, at tann lesandi møtir regluliga til undirvísing. Harumframt verður væntað, at tann lesandi er fyrireikaður til undirvísing, luttekur í kjaki og framløgum, umframt at tann lesandi tekur ábyrgd fyri egnari læring.

Samstarv, samskifti og uppgávuloysn eru týðandi førleikar í námsfrøðingayrkinum, og tí hevur tað alstóran týdning, at tann lesandi mennir hesar førleikar gjøgnum útbúgvingarskeiðið

Luttøkuskyldan krevur, at tann lesandi:

- tekur ábyrgd fyri egnari læring
- møtir væl fyrireikaður upp til undirvísingina
- er virkin í bólkaarbeiði, uppgávuloysn, framløgum, kreativum arbeiði, verkætlanum, verkstøðum, kjaki, starvslæru, evnisvikum og øðrum fyriskipaðum virksemi í undirvísingini
- letur uppgávur inn rættstundis
- er til staðar og virkin í undirvísingini

Avvarðandi undirvísari heldur eyga við og noterar uppmøtingina og virknu luttøkuna hjá hvørjum einstøkum lesandi.

Upplivir undirvísarin áhaldandi, at tann lesandi ikki ger tað, ið verður væntað, so ger hann hin lesandi varugan við, at lestrarvirkið ikki er nøktandi biður tann lesandi at bøta um hesi viðurskifti.

Um hetta prátið ikki ber á mál, so biður undirvísarin lestrarvegleiðingina um at bjóða tí lesandi til eina samrøðu um lestrarstøðuna, og hvussu bøtast kann um lestrarvirkni.

(Sambart reglugerð um lestrarvirkni á Fróðskaparsetur Føroya)

## 9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum

Fyri at menna og góðskutrygga námsfrøðingaútbúgvingina verða øll skeið, serlestur, starvslærur og B.Ed. verkætlanin eftirmett við serligum eftirmetingarskjali. Útbúgvingarsamskiparin fyriskipar og fremur hesa eftirmeting.

Skeið verða eftirmett kvantitativt og einsæris eftir einum felags leisti galdandi fyri øll skeið á Setrinum. Tó er ikki nakað sum forðar fyri, at aðrar eftirmetingar (serliga kvalitativar) verða settar í verk á einstøku útbúgvingunum.

Sama eftirmetingarskjal verður nýtt á øllum deildum á Fróðskaparsetri Føroya, soleiðis at dygdin á undirvísingartilboðnum kann samanberast tvørtur um fakligar geirar.

Tað er umráðandi, at tann lesandi luttekur í eftirmetingunum, og at úrslitið av eftirmetingunum verður nýtt til at gera áhaldandi tillagingar av útbúgvingunum. Tískil er tað ein ábyrgd hjá leiðsluni at útvega vitan um, hvussu tann lesandi upplivir at vera lesandi á útbúgvingini, umframt hvussu tann lesandi hevur uppliva einstøku skeiðini.

Felags eftirmetingarskjalið verður ikki nýtt til starvslæruna.

Metir leiðslan á Námsvísindadeildini, at tørvur er á at fáa aðrar upplýsingar til vega enn tær, ið felags eftirmetingin gevur, so kann leiðslan skipa fyri bæði kvalitativum og kvantitativum eftirmetingum av skeiðum, serlestri, starvslæru og øðrum tiltøkum á deildini.

## 9.16 Kærumøguleikar

Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Námsvísindadeildini.

Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.

Sí annars heimild um kærur í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum er broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kap. 6a.

Um ein starvslæruvegleiðari ger vart við, at ein lesandi hevur havt stórar avbjóðingar í starvslæruni, so verður henda fráboðanin viðgjørd av undirvísaranum, ið hevur ábyrgd av skeiðnum, lestrarvegleiðaranum og útbúgvingarleiðaranum.

Tann lesandi verður innkallaður til samrøðu, og ein ætlan verður gjørd.

## 9.17 Vísindaligt rættlæti (ritstuldur og svik)

Øll endurgáva, sum verður gjørd uttan at gera vart við, at hetta eru tankar hjá einum øðrum, er svik. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er

- at lata uppgávu inn, sum tann lesandi ikki sjálvur hevur skrivað
- at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur
- at endurnýta partar av eini uppgávu, ið er latin inn til annað skeið

Harumframt er avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru tær hjá tí lesandi, eru fingnar.

Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum - bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum - verður hetta revsað, og í ringasta føri kann tann lesandi verða burturvístur av Fróðskaparsetrinum.

## 9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv

Lesandi, ið eru innskrivað til námsfrøðingalestur, skulu hava staðið prógv í seinasta lagi 3 ár eftir ásetta tíð.

Barnsburðarfarloyvi og/ella drúgv sjúkralega kunnu geva lesandi undantaksloyvi frá hesi reglu.

## 9.19 Treytir um broyting í námsskipan

Tá broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu tey lesandi kunnast um, í hvønn mun tey fylgja broyttu námsskipanini ella fylgja eldri námsskipan. Herundir skulu tey lesandi kunnast um tíðarfreistir at gera lesturin lidnan eftir eldri námsskipan. Um tað ikki eydnast tí lesandi at gera lesturin lidnan innan ásettu freist, má søkjast um at fáa tann partin av útbúgvingini, sum hevur fylgt eldri námsskipan, góðskrivaðan, áðrenn farið verður at fylgja nýggju námsskipanini. Tá verða yvirskipaðu mannagongdirnar í sambandi við góðskrivingar fylgdar (sí punkt 9.9).

Um bygnaðurin á útbúgvingini ger tað møguligt, kann tað standa tí lesandi í boði at skifta frá eldri námsskipan til nýggja.

## 9.20 Aðrar ásetingar

### 9.20.1 Stakgreinalesandi

Stakgreinalesandi eru lesandi, sum fylgja undirvísing og fara til próvtøku í einstøkum lærugreinum/skeiðum, uttan at vera innskrivað til fullan lestur.

Stakgreinalesandi fylgja somu treytum sum fulltíðarlesandi (sí punkt 9.7.1)

Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum onnur lesandi.

Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum.

Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri

- undirvísing
- vegleiðing
- próvtøku
- umsiting

Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði.

Nærri kunning um umsóknarblað og gjald fæst á heimasíðu setursins www.setur.fo